*– Hetta er ringasta drápsmálið í Evropa í nýggjari tíð*
*(týska løgreglan)*

SAMBAND
ÁRNI JOENSEN
FARTEKST@MAIL.DK

# ÚTLOND

## Altjóða friðardeild skal hjálpa libanska herinum

Ísrael tekur undir við uppskotinum um, at libanski herurin skal hava eftirlit við marknaleiðini, men hann kann ikki vera einsamallur, sigur ísraelska stjórnin.

Uppskotið hjá libansku stjórnini at lata 15.000 libanskar stjórnarhermenn hava støð norðan fyri ísraelska markið hevur fingið góða móttøku í Ísrael.

– Hatta er eitt áhugavert uppskot, sum vit eru til reiðar at umrøða nærri, segði ísraelski forsætisráðharin, Ehud Olmert, tá hann fór á stjórnarfund í morgun. Á fundinum skuldi stjórnin millum annað tosa um at herða átøkini í Libanon, skrivar Reuters.

Ein talsmaður hjá ísraelsku herleiðsluni segði seinni, at libanska uppskotið kann roknast sum eitt stig á leiðini ímóti friði. Hann gjørdi tó vart við, at 15.000 libanskir hermenn kunnu neyvan tryggja frið á marknaleiðini, og tí er tað framvegis eitt ísraelskt krav, at ein altjóða



friðardeild eisini fær støð fram við markinum, segði talsmaðurin.

Libanska stjórnin heldur hinvegin, at herur hennara er førur fyri at átaka sær uppgávuna. Tá talsmaðurin hjá stjórnini bleiv spurdur, um herurin er førur fyri at taka vápnini frá Hizbollah, svaraði hann stutt:

– Har libanski stjórnarherurin er, er hann einsamallur.

Hetta merkir eisini, at tað er eitt krav frá libansku stjórnini, at Ísrael tekur sínar 10.000 hermenn úr Suðurlibanon. Ehud Olmert hevur fyrr sagt, at teir ísraelsku hermenninir verða ikki tiknir aftur um markið, fyrr enn ein altjóða friðardeild er komin til økið. Diplomatar á ST-borgini í New York siga, at tað kann taka bæði vikur og mánaðir at manna eina tílika deild.

Aftur í morgun søktu ísraelsk flogfør at málum í Libanon, og við eina bygd har suðuri í landinum vóru harðir bardagar millum Hizbollah og ísraelskar hermenn.

## Drápsmaður gongur leysur í Evropa

**Seinastu seks árini eru níggju fólk í Evropa skotin við somu skammbyrsu, men enn er eigarin ikki funnin.**

Løgreglan í Týsklandi viðgongur, at hon stendur á berum, hóast hon hevur kannað málið øll seks árini. Tað einasta, sum løgreglan hevur at halda seg til, er, at øll morðini eru framd við somu skammbyrsu, og at øll fólkini eru skotin á alljósum degi. Átta av teimum myrdu vóru av turkiskum uppruna. Tann seinasti var grikki.

Týska løgreglan sigur seg vera rættiliga sannførda um, at drápsmaðurin arbeiðir einsamallur, hóast vitni sóu tveir menn rýma á motorsúklu frá tí eina drápsstaðnum. Men løgreglan heldur, at vitnini mistóku seg, og at drápsmaðurin var als ikki á motorsúklu.

– Er tað rætt, at maðurin arbeiðir einsamallur, er talan um tann ringasta drápsmannin í Vesturevropa í nýggjari tíð, sigur Alexander Horn, sum stendur á odda fyri kanningunum hjá týsku løgregluni.

Týsku myndugleikarnir hava lovað tí, sum kann avdúka drápsmannin, góðar tvær milliónir krónur í samsýning. Eftir eina sjónvarpssending fyri átta døgum síðani hevur løgreglan fingið einar 25 fráboðanir frá fólki, sum halda seg vita okkurt um mannin, men tað er ikki greitt enn, um hald er í fráboðanunum.

Trupulleikin hjá myndugleikunum er, at tey myrdu høvdu als einki samband við hvør annan, og tí hevur tað verið vónleyst hjá løgregluni at finna nakra orsøk til, hví júst tey níggju vórðu myrd. Seks teirra vóru handils- ella kioskeigarar.

Tað er greitt, at drápsmaðurin er umhugsin, tí enn hevur løgreglan ongantíð funnið nakað patrónhylki á drápsstaðnum. Men kúlurnar hava avdúkað, at hann brúkar eina kekkiska skammbyrsu av slagnum CZ 83, og at skammbyrsan hevur ljóðdoyvara, skrivar DPA.

Illur???
Sig tína meining í Sosialinum




**STUTT SAGT**

### Fann ókenda oyggj

Norski sjómaðurin Finn Isaksen heldur uppá, at hann hevur funnið eina higartil ókenda oyggj við Svalbard, og nú krevur hann, at oyggin skal nevnast eftir sær.

Í brævi til sýslumannin á Svalbard skrivar Finn Isaksen, at eingin hevur vitað um oynna, tí hon hevur ligið undir ísinum í mong ár. Men herfyri var ísurin á leiðini so nógv minkaður, at tann ókenda oyggin kom undan kavi, og tann 11. juli setti Finn Isaksen sum tann fyrsti nakrantíð fótin á oynna. Nú krevur hann, at oyggin skal fáa navn eftir sær, og hann hevur tí skotið upp, at hon skal eita Finnøya.

Sýslumaðurin á Svalbard sigur, at málið er sent teirri serligu navnanevndini hjá myndugleikunum, og hon skal so taka støðu til uppskotið hjá Finn Isaksen, skrivar NTB.

### 638 royndir at myrða Castro

Líka síðani Fidel Castro gjørdist leiðari í Kuba fyri 47 árum síðani, hevur amerikanska fregnartænastan CIA roynt at beina fyri honum, men til fánýtis.



*638 ferðir hevur onkur roynt at beina fyri Castro*

Fabian Escalante, sum hevur verið lívverji hjá Castro, sigur, at hesi 47 árini hevur Castro yvirlivað ikki færri enn 638 morðroyndir. Fabian Escalante var fyrr ovasti í kubansku trygdartænastuni, og hann hevur fleiri ferðir verið við til at avdúka ætlanir um at beina fyri kubanska forsetanum. Royndirnar verða avdúkaðar í einum nýggjum filmi, sum hevur fingið heitið »638 mátar at beina fyri Castro«.

Bretska blaðið The Guardian sífur seg hava sæð filmin. Sambært blaðnum kemur fram har, at CIA framdi eitt ótal av royndum at fáa Castro av vegnum. Eisini sæst, at CIA hevði lagt nógvar morðætlanir, sum kortini ongantíð vórðu settar í verk.

### Stjórnin farin í upploysn

Umleið 40 ráðharrar hava nú sagt seg úr stjórnini í Somalia eftir ósemju millum Ali Mohamed Ghed, forsætisráðharra og Abdullah Yusuf, forseta.

Í seinastuni hava víðgongdir islamistar tikið stórar partar av Somalia. Ghed, forsætisráðharri, hevur sýtt fyri at tingast við islamistarnar, og tá hann sýtti fyri at slaka, fekk hannn sekkin. Tað sama hendi 40 av ráðharrum hansara.

Yusuf, forseti, sigur við BBC, at hann vónar at kunna manna eina nýggja stjórn, sum er til reiðar at tingast við islamistarnar, sum millum annað hava ræðið á høvuðsstaðnum Mogadishu.